# FUNDARBÓK HJÁ VÁGS BÝRÁÐ 2014

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 7**<br>**Tíð:** 8. september 2014, kl. 19.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | | **Skrivari:** Petry Joensen |
| **Fastir fundardagar:**<br>28. januar, 17. februar, 17. mars, 28. apríl, 26. mai, 23. juni, 25. august fl. 8. september, 29. september, 27. oktober, 24. november, 15. desember | **Møttir:**<br>Allir Býráðslimir, uttan Danjal Bjarkhamar og Tórður Poulsen | **Ikki á fundi:**<br>Dánjal Bjarkhamar, fráboðað<br>Tórður Poulsen, fráboðað |

**1) Mál nr.: 13/00188** Innleggja Djúphavnina í Byggisamtyktina.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá havnanevndini. Havnanevndin hevur viðgjørt málið um innlegging av Djúphavnini í Byggisamtyktina fyri Vágs kommunu.
Nevndin mælir til at játta umsóknini.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**2) Mál nr.: 14/00034** Val av limum og varalimum í stýrið fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til kunningar Viðtøkur fyri javnbjóðis samstarv millum Sumbiar-. Vágs-, Porkeris-, Hovs-, Fámjins-, Tvøroyrar- og Hvalbiar kommunu.

Almannamálaráðið hevur í skrivið dagfest 15. juni 2014 boða frá at grunda á at kommunurnar í Suðuroy ikki hava verið førar fyri at skipa seg í kommunalt samstarv sambært §4, stk. 1 í løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. so hevur landsstýriskvinna við heimild í §5 í nevndu lóg skipa hetta kommunala samstarv sambært 4, stk. 2 í somul lóg.

Sambært §7, stk. 1 í LL 20, eru allir borgarstjórarnir í Suðuroynni limir í stýrinum. Harumframt fáa Tvøroyrar- og Vágs kommuna sambært §7, stk. 2 í LL 20 hvør sítt umboð aftrar.

Vágs kommuna hevur 2 limir, harav annar er borgarstjórin og 2 varlimir, sum skulu veljast millum kommunustýrislimirnir.

Undirskriva:

**Avgerð:**
Samtykt við 5 atkvøðum fyri at velja
Dennis Holm sum lim og Danjal Bjarkhamar sum varalim
Eydis Kjærbo sum lim og Poul W. Augustinussen sum varalim

Heri Hjelm og Conrad Gaard Joensen atkvøddi ikki.

**3) Mál nr.: 14/00047** Marknaumskipan.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 614m og 575 í Vágs bygd.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**4) Mál nr.: 14/00122** Skipan av ungdómshúsið.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli viðv. skipan av framhaldandi ungdómstilboði fyri 2014.
Mentunarnevndin samtykt á fundi 21. august málið viðvíkjandi framhaldandi skipan og játtan til ungdómstilboði fyri 2014. Fíggjarnevndin samtykti á fundi 22. august 2014 at leggja tilmæli frá Mentunarnevndini fyri Býráðið.
Mentunarnevndin hevur mælt til at tilboði heldur áfram:

- Leiðarin verður settur 30 tímar sum varaleiðari undir leiðslu av leiðaranum í Eikilund
- Byrjað verður við 20 starvsfólkatímum aftrar leiðara, Eikilund letur tímar av sínari normering.
- Mentunarnevndin hevur ynskið um at tað verður opið eftir løgdu ætlan eisini fríggjakvøld
- Opnað veður tá leiðarin metur at klárt er.
- Mælt verður til at játta 400.000,00 kr. fyri árið 2014.

**Avgerð:**
Samtykt at beina málið í mentunarnevndina aftur. Grunda á, at nýtt tilmæli er komi frá virkandi leiðara. Málið verður lagt fyri býráðið á næsta fund.

Undirskriva:

**5) Mál nr.: 14/00135** KT-trygdarpolitikkur hjá Vágs kommunu.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram Endaligt uppskot til KT-trygdarpolitikk fyri Vágs kommunu. Vágs býráð viðgjørdi hetta eisini á fundi 16. juni og ynskti tá onkrar broytingar sum í verandi uppskotið eri innskrivaðar í síða 4 “Atgongd”.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**6) Mál nr.: 14/00136** Adressur til útstykkingina við Kykslið.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá Teknisku deild sum ynskir at støða verður tikin til um nýggi býlingurin skal hava adressu Vágsvegur ella varðveita navnið við Kykslið. Mentunarnevndin mælir til at varðveita navnið við Kykslið.
Sambært kommunustýrisskipanin hjá Vágs kommunu er tað Vágs Býráð sum endaliga tekur støðu.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við Mentunarnevndini.

**7) Mál nr.: 14/00156** Umsókn um byggiloyvið á matr. nr. 172l.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli Teknisku- og Havnanevndini sum á felags fundi hava samtykti at mæla til at játta umsóknini um víðkan av Vágsverkinum (SEV), treyta av góðkenning frá Landsverk.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum.

**8) Mál nr.: 14/00164** Umsókn um skattafrælsi til ummælis.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umsókn um skattafrælsi frá Vágs bóltfelag.
Áðrenn taks-ráðið tekur avger skal tað fáa sær til vega álit frá avvarðandi býráði.
Fíggjarnevndin viðgjørdi hetta á fundi 22. august og mælir býráðnum til at játta skattafrælsi.

**Avgerð:**
Eydis Kjærbo var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan.
Einmælt samtykt.

Undirskriva:

**9) Mál nr.: 14/00188** Uppskot um kvøldskúlasamstarv.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot um kvøldskúlasamstarv millum Vágs-, Porkeris-, Hovs- og Sumbiar kommunu

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við at skipa hetta samstarvið.

Undirskriva: